**LAGT TIL RÆTTIS:** Eirikur Lindenskov

# Aftur um standmyndina

## 14 UPPSKOT TIL LISTAVERK FRAMMAN FYRI FIMI

Tórshavnar kommuna gjørdi av í 2007, at 1,5 prosent av kostnaðinum, tá kommunan byggir, skuldi brúkast til listarverk. Síðani hava verið fleiri kappingar um listprýðing, eitt nú Skúlin á Løgmannabreyt, Skúlin á Argjahamri, og seinast valdi Listabólkurin í Tórshavnar kommunu, at skulptururin hjá Guðri Poulsen, »Himmalspegilin«, skal prýða framman fyri Fimi í Gundadali.

### Kjak um valið

Tað hevur so ofta verið kjakast um valið av listprýðingum í Tórshavnar Kommunu, og Listabólkurin gjørdi tí í sambandi við kappingina um at listprýða Fimi, at uppskotini skulu sýnast fram fyri almenninginum eftir avgerðina.

Her ber nú til hjá fólki fyri fyrstu ferð at gera sær inntrykk av tí grundarlagnum, sum Listabólkurin hevur arbeitt út frá í sambandi við kappingina um almenna listprýðing í Tórshavnar Kommunu. Hetta gevur høvi til kjak um almenna listprýðing í Tórshavnar kommunu kann førast á einum fakligum og seriøsum grundarlag.

Framsýningin »Aftur um standmyndina – 14 uppskot til listaverk framman fyri Fimi« er opin í Fimi í Gundadali tilsunnudagin 16. januar 2011 og kann vitjast hvønn dag frá klokkan 9 til 21.

### Lesarar atkvøða

Hevur Listabólkurin í Tórshavnar kommunu gjørt rætta valið? Avgerðin er tikin og hon kann ikki broytast, men er hon røtt eftir tíni meting? Nú hevur tú møguleikan at atkvøða um tey 14 uppskotini, sum tú heldur vera frægast. Vitja framsýningina ella les um verkini og hygg eftir myndunum her á síðuni.



## Lýsing av uppskotunum:

**Soleiðis kanst tú atkvøða**

*Tú kanst atkvøða við at senda ein sms til nummar 1940. Tú kanst bert atkvøða eina ferð, og tú atkvøður við at senda.*

*Kostnaðurin er 5 kr. + vanligan takst*
*Seinasta freist at atkvøða er 14. januar 2011*

***Øll, ið atkvøða, eru við í lutakastinum um eitt árshald av Sosialinum***



### Brandur Patursson

Stødd: 5 x 2 x ca 1 m
Materiali: 3 mm rustfrítt stál.
Prísur: 400.000 krónur
Yvirkroppurin av einum mannafiguri við útbreiddum armum, sum hyggja uppeftir.

***Atkvøð fyri hesum listarverki:***
***Send sms-boð við tekstinum »sos 1« til 1940***



### Heðin Ferjá Heldarskarð

Stødd: 8 x umleið 2,25 x 2 m
Materiali: Rustfrítt stál, stabbagrót
Prísur: Umleið 400.000
6 stálbugar settir saman tveir og tveir á tríggjar soklar av stabbagróti á rað.

***Atkvøð fyri hesum listarverki:***
***Send sms-boð við tekstinum »sos 2« til 1940***



### Jógvan Horn: Sólur

Stødd: Diametur: 5 m, hædd: 1,70 m
Materiali: Svart polerað granitt, rustfrítt stál.
Prísur: 180.000
Eitt horsontalt sólur við tímalinjum, sum vísa klokkuna. Tríggjar kurvar vísa, hvar skuggin fellur á javndøgn, ólavsøku og longsta dag.

***Atkvøð fyri hesum listarverki:***
***Send sms-boð við tekstinum »sos 3« til 1940***



### Finnleif Mortensen

Stødd: 5,16 x 4 x umleið 1,5 m
Materiali: 25 mm og 50 mm stál
Prísur: Umleið 540.000 krónur
4 menniskjafigurar, sum gera fimleik og aðrir geometriskir formar skornir út í eini stálplátu. Sett upp soleiðis, at skuggar frá sólini síggjast á lendinum.

***Atkvøð fyri hesum listarverki:***
***Send sms-boð við tekstinum »sos 4« til 1940***



### Gianfranco Nonne: Spor

Stødd: 3,30 x 1 x 1,70 m
Materiali: Bronsa, bassalt
Prísur: 550.000 krónur
Tríggjar bronsuflísar á einum bassaltsokkuli við einum fótaspori og tvær gangandi føtur omaná.

***Atkvøð fyri hesum listarverki:***
***Send sms-boð við tekstinum »sos 5« til 1940***